## Bílegg tíð

Til ber at bíleggja tíð á telduposti boyli@boyli.fo ella á telefon 660700.

## Opið

Sí boyli.fo

Boyli

Klaksvíksvegur 85
700 Klaksvík

Tel 660700
boyli@boyli.fo

# Leysir boylar

Boyli

# Ymisk sløg av leysum boylum

**LEYSIR BOYLAR** eru oftast 'skrúvuboylar', sum oftast arbeiða við at skapa pláss.

Tað skal skrúvast eina ella tvær ferðir um vikuna. Tað vegleiða vit um. Hesin skal brúkast altíð uttan tá tú etur og bustar tenn.

**AKTIVATORBOYLI** er ein vakstrarboyli. Brúka hann mest møguliga, men ikki í skúlanum. Tað vil siga umleið 14-16 tímar um samdøgnið.

**TWIN BLOCK** er ein onnur varatión av vakstrarboyla, sum er í tveimum partum, hesin skal brúkast umleið 24 tímar um samdøgrið.

## Fái eg ilt?

Viðgerð við leysum boyla gevur ikki pínu í tennirnar. Tó merkist í andlitsmusklum at viðgerðin er í gongd.

Hugsa bara, at meir tú brúkar boylan, betur og skjótari gongur viðgerðin.

## Eftirlit

Tú kemur til eftirlit á klinikkini umleið 10.-12. hvørja viku. **Minst til at hava boylan við.**

## Reingerð av leysum boylum

Boylin skal bustast morgun og kvøld. Brúka kalt/lunkað vatn og vanliga hondsápu og onkuntíð við tannkrem. Ikki skolda boylan. Vaska eisini boylaeskjuna av og á.

## Ansa væl eftir boylanum

Tú fært eina eskju frá okkum at hava boylan í. Tá boylin ikki er í munninum, skal hann vera í eskjuni.

